# Hjálp okkum at vaksa...



**Orsakað av vaksandi virksemi uttanlands søkja vit eftir trimum virkisfúsum starvsfólkum til at arbeiða við Navision.**

**Arbeiðsøkið**
Talan er um virksemi, sum er knýtt at Microsoft Dynamics NAV (eisini kent sum Navision). Talan er um brúkarahjálp, installatión og uppsetan, forritan, umframt ráðgeving innan hetta yrkið. Sum fráliður má roknast við eini ávísari spesialisering.

**Vangamynd**
Vit vænta, at tú ert millum 25-35 ár og hevur útbúgving innan handilsskúla, har minsta krav er HH. Tú hevur somuleiðis innlit í bókhald.

Tú hevur arbeitt við og hevur rímiligt innlit í fíggjarstýringsskipanina Microsoft Dynamics NAV.
Tú ert tøkniliga forvitin (brennur fyri nýggjari tøkni) og hevur ringt við at halda teg burtur, tá nýggjur útbúnaður kemur á marknaðin.
Tú hevur hegni, áhuga og vilja at læra teg aðrar ritbúnaðir, t.d. útbúgving innan Microsoft SQL og undirstøðukervi, ið eru ein fyritreyt fyri at røkja uppgávurnar innan Microsoft Dynamics NAV.
Tú heldur, at fíggjarstýring og vinnubúskapur er eitt spennandi arbeiðsøki og ynskir eina framtíð innan hetta økið.

**Formula bjóðar**
Vit bjóða eitt spennandi arbeiðsumhvørvið og eitt gott vinarlag millum starvsfelagar, har fakligu avbjóðingarnar eru í hásæti.
Góðir møguleikar eru fyri persónligari menning og fyri eftirútbúgving.

Møguleiki er eisini fyri skiftandi arbeiðsavbjóðingum, bæði innanlands og uttanlands. Harumframt bjóða vit starv í einum sterkum felagi við einum sunnum rakstri og eini eginogn uppá 36 mio., har eginfíggingin er 54%.
Vit bjóða eina kappingarføra løn, sum verður ásett eftir royndum og útbúgving.

**Umsókn**
Umsóknarfreistin er 1. mars 2010 og skal umsóknin við prógvum sendast til Fróða Magnussen, stjóra, á **fm@formula.fo**.

Eru spurningar til starvið, ber til at senda ein teldupost til somu teldupostadressu.

Microsoft Dynamics

**formula.fo**

Formula er heildarveitari av KT tænastum til privatar fyritøkur, almennar mynduleikar og stovnar. Vit eru Gold Certified partnari hjá Microsoft og umboða alla vøruskránna hjá Microsoft. Harumframt umfatar kjarnuvirksemi okkara uppsetan, rakstur og viðlíkahald av KT kervum; søla av telduútbúnaði; søla og tænastuveitingar innan print og kopi; søla og tænastuveitingar til fiskivinnuna; søla og tænastuveitingar av eginmentum forritum, sum t.d. Totalview, sum í dag hevur yvir 60.000 brúkarar, harav gott 50.000 uttanlands og forritinum Invoice Workflow, sum vit hava selt meira enn 100 loysnir av, harav 80 uttanlands. Okkara missión er at hjálpa okkara viðskiftafólkum at optimera teirra virksemi. Vit miða eftir at verða millum bestu og fremstu arbeiðspláss, har starvsfólk eru virkisfús og trívast. Umvegis dugnalig og ábyrgdarfull starvsfólk miðsavna vit okkum um at loysa uppgávuna soleiðis, at kundin er nøgdur. Formula er partur av Føroya Tele samtakinum og saman eru vit partaeigarar í donsku KT fyritøkuni Norriq. 65 fólk starvast á Formula.

formula.fo stiðjagøta 5 & 11 postboks 1078 fo-110 tórshavn tel. 34 40 00 fax 34 40 01 www.formula.fo



# HJÁLPARFÓLK til Suðuroyar Apotek

Søkt verður eftir hjálparfólki fyribils í 1 ár at byrja 1. mars.

Tú skal hava góð samstarvsevnir, koyrikort og kunnleika til teldu.
Arbeiði umfatar vøruhandfaring, at pakka post, og annað fyrifallandi arbeiði.
Arbeiðstíð: 30 tímar um vikuna.
Løn sambart galdandi sáttmála við Starvsmannafelagið.
Send skrivliga umsókn við møguligum prógvum áðrenn 15. februar til:

Suðuroyar Apotek - undir Heygnum 4 - 800 Tvøroyri - tlf. 371076
www.apotek.fo

Á Høgabóli · 600 Saltangará · Tel 44 76 04 N. Finsensg. 18 · 100 Tórshavn · Tel 36 30 00




Thomas Dam búnýti

Sosialurin / K-R 34 18 00